

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 02 - 2013

# Bilverkstøð í miðdepli á orkustevnu

Tað er ikki hvønn dag, at privatar fyritøkur í Føroyum fáa umhvørvisgóðkenning og als ikki bilasølur og bilverkstøð. Reyni Service og Auto Service eru tó undantók og fingu umboð fyri fyritøkurnar báðar handað heiðursprógv fyri ISO 14001 umhvørvisgóðkenning frá Det Norske Veritas, DNV á orkustevnuni í Havn um vikuskiftið. Sámal av Reyni, stjóri hjá Reyni Service sigur við oljan.fo, at tey mettu tað hava stóran týdning fyri fyritøkuna at fáa hesa umrøddu umhvørvisgóðkenning. Hon inniber reglur og fyrilit, sum skulu verja umhvørvi, vera orkusparandi og hava atlit til at skilja og endurbrúka burturkast. Eg haldi vit eiga at kenna ábyrgd fyri umhvørvinum. Tað hevur so eisini týdning fyri eina fyritøku sum okkara, at vit kunnu branda okkum við slíkari góðkenning. Í Danmark velja kommunur og tað almenna oftani at brúka fyritøkur, sum eru ISO góðkendar, sigur Sámal av Reyni og heldur fram - Vit ganga høgt upp í at minka talið á skaðiligum vørum og hinvegin hækka talið av ruskbólkum, so alt burturkast verður væl og virðiliga skilt og helst endurnýtt, har tað ber til. Vit hava fastar mannagongdir og brúka umhvørvisroknskap sum eitt stýrandi og vegleiðandi amboð í gerandisdegnum. Í Føroyum eru tað annars serstakliga fyritøkur innan olju- og frálandavinnuna, sum hava hesa umhvørvisgóðkenning. Tað er eitt krav fyri eitt nú frálandareiðarí, og tí eru tey føroysku reiðaríini, Thor og Skansi ISO góðkend. Eisini SEV og Kommunala Orku- og Brennistøðin hava hesa góðkenning. Tað var Heðin Mortensen, borgarstjóri saman við umboði fyri Norsk Veritas, sum handaði umhvørvisgóðkenningarnar. Heðin Mortensen segði í síni røðu, at tað er at fegnast um, at alsamt fleiri føroyskar fyritøkur fáa sær slíka umhvørvisgóðkenning. Myndir Frá orkustevnuni í Havn um vikuskiftið. Vit síggja stjórarnar í Reyni Service, Sámal av Reyni og Auto Service, Poul Jákup Poulsen taka ímóti heiðursprógvunum frá umboði fyri